# Djóradagar í Havnardali



Leygardagur 24. mai 2003

Kl. 14.00 Økið letur upp
Djóraframsýning
Framsýning av útgerð
Søluítøk (matur og drekka)
Fiskibrunnur
Mekaniskur tarvur
Hoppiborg
Gladiatorbani
Søla av seðlum til neytamýkjukapping

Kl. 14.30 Greðingaframsýning
Ríðiframsýning (børn)
Ríðiframsýning (vaksin)

Kl. 16.00-18.00 Ponyríðing

Kl. 18.00 Økið letur aftur

Sunnudagur 25. mai 2003

Kl. 14.00 Økið letur upp
Djóraframsýning
Framsýning av útgerð
Søluítøk (matur og drekka)
Fiskibrunnur
Mekaniskur tarvur
Hoppiborg
Gladiatorbani
Søla av seðlum til neytamýkjukapping

Kl. 14.30 Ríðiframsýning (børn)
Ríðiframsýning (vaksin)

Kl. 15.30 Kapping í tarvaríðing

Kl. 16.00-18.00 Ponyríðing

Kl. 18.00 Økið letur aftur og tarvurin verður sleptur inn um gyrðingina



MBM sýnir fram rossaútgerð og el-hegn.



# Kunngerð

## um uttangarðsútskiftingarfund í Sumba

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund hósdagin 12. juni kl. 14.00 í húsinum hjá millumbylgjusendaranum í Akrabergi.

Til viðgerðar verður útskifting av hagapartinum Blæing, Heimaripartur.

Nevndarlimir eru Louis Houmann, Oyndarfjørður, og Súsanna í Búðini, Velbastaður.

N.v.
**Øssur Á. Midjord**
**útsk. form.**

# Stevningsmaður

Søkt verður eftir stevningsmanni fyri Norðoyggjar skjótast til ber.

Umsóknir vera at senda Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, Postbox 28, 110 Tórshavn innan 26. mai 2003.

Løn og setanarviðurskifti eru sambært kunngerð frá Justitsministeriet frá 15. apríl 2003.

**Sorinskrivarin í Føroyum**
tann 19. mai 2003

Jørgen B. Petersen
adm.

**Vágs kommuna**

# Leiðari, pedagogar og hjálparfólk

## til nýggja Dagstovnin og Frítíðarskúlan í Vági

**Vágs kommuna søkir við hesum eftir leiðara, pedagogum og hjálparfólkum til nýggja Dagstovnin í Vági, sum letur upp í august mánað 2003.**
**Somuleiðis verður søkt eftir pedagogi til frítíðarskúlan.**

**Vit vænta**
At tú:
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum
- Er álitandi, kann arbeiða sjálvstøðugt, er førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum
- Dámar at vera úti saman við børnunum

**Lønarviðurskifti:**
Størvini verða sett eftir avtalu, sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meira fæst at vita**
um størvini, við at venda sær til kommunuskrivstovuna telefon 373024.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum skulu vera Vágs kommunu í hendi í seinasta lagi 20. juni 2003.

Viðmerk á brævbjálvan »starvsfólk«

**Vágs kommuna**
**Mentanarnevndin**

SANDAVÁGS KOMMUNA

# Bátaspæl til sølu

Gamla, elrikna bátaspælið í Sandavági er til sølu til hægstbjóðandi.

Áhugað kunnu venda sær til

**Sandavágs Kommunu**
Tlf. 33 24 70
360 Sandavágur

# Túrur í Havn

at síggja urtagarðar verður týsdagin 27. mai 2003, kl. 19.00. Vit hittast við Vesturkirkjuna.

**Føroya Urtagarðsfelag**



**Fiskimálaráðið**
*Skipaeftirlitið*

# Lýsing frá Sjóvinnufyrisitingini

Sjóvinnufyrisitingin er frá 1. mai 2003 løgd saman við Skipaeftirlitinum. Øll skrivstovu avgreiðsla og alt samskifti viðv. sjóvinnubrøvum, manningarskjølum, undantaksloyvum og øðrum viðurskiftum Sjóvinnufyrisitingin tekur sær av, verður framyvir avgreitt á Skipaeftirlitinum í Miðvági.

Adressa:
Skipaeftirlitið/Sjóvinnufyrisitingin
Postsmoga 26
370 Miðvágur

Tlf. 35 56 00 · Fax 35 56 01
Teldupostur: fma@fma.fo

Ynskja tygum nærri upplýsingar, kunnu tygum ringja á tlf. 35 56 00 ella 35 30 30 og spyrja eftir Johild Ziskason, fulltrúa.

# Hoyggjturkari



- Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
- Biligur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman
- íroknað streym og dieselolju
- Tú kanst turka gras í oysandi regni
- fyri umleið kr. 20,- um tíman
- Kvalitetur og long livitíð
- Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

**Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.06.03**

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

Sosialurin 341800

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Gøtuljósadeildin**

Gøtuljósadeildin heldur til í Torfinsgøtu 21, har arbeiða 5 mans.

Høvuðsarbeiðið á deildini er umvæling av verandi gøtuljóskervi og nýgerð í samband við m.a. útstykkingar.

Í kommununi eru á leið 5.000 gøtuljós.

www.torshavn.fo

## Elektrikari til Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir eftir elektrikara til gøtuljósadeildina. Arbeiði snýr seg í høvuðsheitum um at koyra kurvabilin og viðlíkahald og nýgerð av gøtu- og ferðsluljósum í kommununi.

**Fagligir eginleikar**
Vit vænta, at tú hevur útbúgving sum elektrikari og hevur koyrikort.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber . Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jákup Joensen, gøtuljósleiðara, ella Viggo Christiansen, deildarleiðara , tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. juni 2003. Merk umsóknina "Elektrikari".

Toll- og Skattstova Føroya
Vága øki

# Avloysarastarv á Toll- og Skattstovu Føroya, Vága Øki

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hja landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Vága Øki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 11 starvsfólk.

Á Toll- og Skattstovu Føroya ,Vága Øki er avloysarastarv svarandi til fulla starvstíð leyst at søkja fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi frá 16/6 2003 - 15/4-2004.

**Arbeiðsuppgávur**
Talan er um fjølbroytt arbeiði, ið umfatar bæði eftirlitsarbeiði og avgreiðslu og eru uppgávurnar m.a. hesar:

- persónlíkning, fyribilslíkning, stuðulsskipaninar, journal, dupultskattamál, eftirlønir/rentutrygging.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal helst hava skrivstovuútbúgving e.l., vera arbeiðssamur, fyrikomandi og duga væl at leggja arbeiði til rættis. Stórur dentur verður lagdur á, at viðkomandi arbeiðir sjálvstøðugt, er vanur við teldu-arbeiði - kunnleika til EDV er ein fyrimunur - og skal vera førur fyri at mynda avgerðir í dagliga arbeiðinum. Tað er ein fyrimunur við arbeiðsroyndum innan skattalóggávuna.

**Setunarviðurskifti**
Løn og setunarviðurskifti verða ásett eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving, arbeiðsroyndir og møgulig viðmæli skulu sendast til Toll- og Skattstovu Føroya, Vága øki **innan 28 mai 2003**.

**Nærri frágreiðing um starvið** fæst við at venda sær til Elsu Brimvík, økisstjóra á tlf. 357700.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Vága Øki
380 Sørvágur

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Býlingshúsið á Ternuryggi**

Í Býlingshúsinum á Ternuryggi ganga 52 børn.

Stovnurin er skipaður við 2 barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og einari vøggustovu við 12 børnum. Á stovninum eru 12 starvsfólk.

Vit bjóða eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika at gera tína ávirkan galdandi saman við hinum starvsfólkunum, og møguleika at skapa eitt mennandi umhvørvi fyri børnini

www.torshavn.fo

## Pedagogar til Býlingshúsið á Ternuryggi

Tórshavnar kommuna søkir eftir 2 pedagogum til Býlingshúsið á Ternuryggi at byrja 11. august 2003 ella eftir avtalu. Talan er um eitt starv í vøggustovu og eitt starv í barnagarðsstovu. Bæði størvini eru 30 tímar um vikuna.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur sín stóra leiklut í gerandisdegnum, og har tú fært høvi at gera tína ávirkan galdandi.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Heidi Henriksen, leiðara, ella Hildur D. Samuelsen, varaleiðara tlf.318626.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Býlingshúsinum á Ternuryggi, Turiðargøta 5a, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin16. juni 2003.